





# Ársaðalfundur

Fornminnisfelagið í Nes kommunu heldur ársaðalfund í gamla prestagarðinum á Nesi 19. mars 2005 kl. 15.30.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**




UNITED Seafood

# Formaður

P/F United Seafood søkir eftir formanni til virkið á Tvøroyri.

United Seafood Tvøroyri virkar serliga upsa, kongafisk, svartkalva og hýsa. Vørurnar ið virkaðar verða eru á høgum góðskustigið og fevna um m.a. catering vørur eins og frystar ídnaðarvørur. Framleidd verður nakað av feskum fløkum. Arbeiðið fer fram sambart innaneftirlitsskipan. Virkið virkar umleið 6000 tons av rávøru árliga.

**Uppgávurnar hjá formanninum verða m.a. :**
- Samskipan av arbeiðið við reinskering, pakking, portionering og frysting.
- Programmering av tøkniligari útgerð .

**Fyrimun hevur umsøkjari ið hevur:**
- Royndir innan samskipan av arbeiði
- Royndir innan fiskaarbeiði
- Royndir við tøkniligari útgerð
- Kunnleika til teldunýtslu

**Vit kunna bjóða:**
- Eitt avbjóðandi starv á einum flakavirki í broyting
- Løn sambært avtalu

Umsóknarfreistin er í seinasta lagi 12. mars 2005. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Byrjað verður í starvinum eftir avtalu.

Um áhugi er fyri hesum starvi so kunna tygum taka samband við :

**UNITED SEAFOOD,**
Postbox 30
FO-800 Tvøroyri
Att.: Bjarni Hansen, virkisleiðari tlf. 598101

# Kunngerð

## frá útskiftingarnevndini fyri Hests bygd

Útskiftingarnevndin fyri markatalsbygdina Hestur hevur á fundi tann 1. mars 2005 viðgjørt kærurnar um góðskumetingina.

Nevndin staðfesti skjal nr. 7 og 8, góðskumetingin (boniteringin), framløgd á útskiftingarfundi í Hesti 17. november 2004, við hesum broytingum:

Lutir nr. 708, 717 og 719 verða 15%.
Lutur nr. 385 verður 55%.

Eftir grein 51 í lóg nr. 147 frá 27. mars 1939 við seinni broytingum, verður góðskumetingin latin serskild til ákæru.

Kærufreistin er 3 mánaðir frá 15. mars 2005 at rokna, og skulu møguligar kærur verða skrivligar, stílast til yvirútskiftingarnevndina, Sorinskrivarin, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn. Kærurnar skulu vera Sorinskrivaranum í hendi í seinasta lagi tann 15. juni 2005.

Øssur Á. Midjord,
útskiftingar formaður

# Tekniskur umsjónarmaður (Inspektør)

Grundað á, at virksemið felagsins verður økt, verður hervið søkt eftir einum maskinmeistara.

**Arbeiðsuppgávur:**
Arbeiðsplássið er fyrstu tíðina, at virka sum maskinmaður umborð á einum av skipum okkara, síðani sum tekniskur umsjónarmaður (inspektør), út frá skrivstovuni í Hósvík.

**Starvið sum tekniskur umsjónarmaður (inspektør), inniber:**
- At taka sær av teknisku/rakstraligu/viðlíkahaldsligu viðurskiftunum hjá skipum felagsins.
- At gera fíggjarætlanir og fylgja teimum upp.
- At gera tekniskar útrokningar viðvíkjandi skipunum.
- Umsjón og eftirlit av okkara skipum, herundir at gera fyrireikingar til dokkingar.
- Viðlíkahald av og at menna skipsteknisku forritini.
- Ymsar fyrifallandi uppgávur - herundir neyðug ferðing í samband við arbeiðið.

**Førleikakrøv**
Útbúgving sum maskinmeistari og praktiskar royndir í sigling.
Kunnleika til arbeiði í reiðaríið, galdandi reglur og lógir, viðvíkjandi skipstekniskum og fyrisitingarligum viðurskiftum.
Góðan kunnleika til nýtslu av nútímans arbeiðsamboðum eins og kunningartøkni.
Førleika at samskifta munnligt og skrivligt á føroyskum og enskum.
Verða ábyrgdarfullur og røkin. Góð samstarvsevni.

**Løn og setanartreytir**
Eftir avtalu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Gunnbjørn Joensen, stjóra, tlf. 422503, fartel, 585801 ella teldupost: gunnbjor@thor.fo.

**Umsóknin** saman við avritum av prógvum og møguligum ummælum skal sendast til

**P/F THOR**
Bryggjan 5
420 Hósvík

Umsóknin skal verða okkum í hendi, áðrenn 10. mars 2005.

***P/F THOR**, er eitt felag, sum eigur og rekur skip í olju-vinnuni, fiskivinnuni, og hevur annað virksemi í hesum sambandi, víst verður til heimasíðu okkara www.Thor.fo.*

